# Tá allir prestar vóru føroyingar, og Sandsprestur Eisenberg varð valdur til próst

Vísindavøkan á ferð, Sands bókasavn 14. sept. 2023

Jákup Reinert Hansen, Fróðskaparsetur Føroya

# Veiðiferð í Keypmannahavn febr/mars 2023






# Próstaskifti

- 2. dec. 1775 sendir Andrias Djurhuus, hjálparprestur á Nesi, Ludvig Harboe, Sælands biskupi, skrivlig boð um, at pápi hansara, Christen Djurhuus, próstur, eftir bert 9 daga sjúkralegu er deyður dagin fyri av einum herviligum fepuri, sum gongur. "Upplagið" ella Rybergs handil í Vágsbotni hevur økt munandi um skipaferðsluna, og tí er høvi at fáa brævið av landinum. Andrias letur heilsa biskupi og húski hansara frá síni syrgjandi "mama".
- 20. febr. 1776 skrivar biskupur aftur til Andrias og heitir á hann um senda bræv sítt runt til allar prestar og biðja teir velja, hvønn teir vilja hava til próst.
- 3. juni 1776 skrivar Andrias, at svarini eru innkomin; men tvey koma tó nakrar dagar seinni, frá Matras á Viðareiði 4. juni og frá Poul Weyhe í Havn 25. juni.
- Tá ið eg setti meg at lesa tey, varnaðist eg, at prestarnir allir sum ein vóru føddir og barnvaksnir í Føroyum.

# Prestar í Føroyum á sumri 1776

| Prestagjald | Prestur | Foreldur | Aldur | Hjálparprestur | Sóknar-prestur | Starvsaldur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | Albert Michael Matras | Hans Albertsen Matras, landslækni, Tórshavn | 60 | 1760 | 1766 | 16 |
| **Eysturoy** | Andreas Christensen Djurhuus | Christen Jensen Djurhuus, prestur og próstur, og Inger Smidt, Nes | 34 | 1766 | 1775 | 9 |
| **Norðurstreymoy** | Hans Olufsen Wang | Oluf Hansen Wang, prest, og Anna Christensdatter Spliid, Kvívík | 42 | 1760 (ikki prestvígdur) | 1762 | 14 |
| **Suðurstreymoy** | Poul Weyhe | Johan Henrik S Weyhe, føddur í Hvalba, meðan pápin var kapellanur | 40 | 1760 | 1770 | 16 |
| **Vágar** | Samuel Christoffer Svabo | Hans Christoffersen Svabo, presur, og Marie Samuelsdatter, Miðvágur | 40 | 1763 | 1764 | 13 |
| **Sandoy** | Jacob Frederiksen Eisenberg | Frederik Jonassen, sorinskrivari, og Maren Jacobsdatter Eisenberg, Tórshavn | 52 | 1750 | 1761 | 26 |
| **Suðuroy**<br>**Sóknarprestur** | Antonius Haldansen | Haldan Antoniussen, bóndi, og Maren Niclasdatter, í Kálgarðinum í Sumba | 57 | 1750 (Norðurstreymoy) | 1757 | 26 |
| **Suðuroy**<br>**hjálparprestur** | Kristoffer Rasmussen Müller | Rasmus Poulsen, bóndi í Dalsgarði, og Maren Christophersdatter Müller, dóttir Christopher Müller, prest í Norðurstreymoy, f í Skálavík | 33 | 1751 | | 5 |

# Müller: Ikki velja Haldansen!

- a) Stedets langtfraliggenhed og den vanskelige overfart paa Suderøe-fiorden tillader ingen Provst der.
- b) Hr Haldansen er vel lærd, brav studeret og dræven i lov og ret, men nu formedelst sin overmaade fædme, ubeqvemhed og stivhed i sine knæer gandske uformuende til at gaae en kort vei, endsige reise som Provst til visitats om Færøe til lands og vands, ja hand kand næppe reise sig af sit sæde, og ei komme til sin hoved kirke i Qvalbøe uden i got veir da hand rider den jevne og korte vei med stor frygt og 5 a 6 friske karle maa gaa omkring hesten om den skulde falde, thi hand kand intet hielpe sig selv;
- c) Er hand ei vederhæftig eller sufficient at betroe de Publiqe midler til, da hand er fattig og forgiældet.
- d) Hands retsindighed i Embedets førelse, ustrafelighed i levnet og forhold, Kirke-Disciplin, og fliid med ungdommens fremgang i Guds kundskab, har, disværre, kun været maadelig;
- e) Ikke heller er det mueligt, at Jeg kand forrette Provste-embedet i hands sted

# Ikki velja Matras!

- At recomendere Hr Matras til Provste-Embedet fraraader mig:
- deels Norderøernes langtfraliggenhed og ubeqvemhed til Provste-sæde,
- deels hands fra ungdommen op indgroede magelighed og seendrægtighed til alle slags forretninger, og følgelig ubeqvemhed til Provste-Embedet og visitats reiser;
- deels hands uformuende tilstand da Jeg nepe anseer ham sufficient til at anbetroes de Publiqe midler;
- deels hands uforfarenhed i lands lov og ret, saa vidt mig er bekiændt;
- men for hands redelige hensigt i sit Embedes førelse samt ustrafelige forhold i liv og levnet kunde hand vel været beqvem til Provste-embedet efter min beste indsigt;

# Vel Eisenberg!

- a)Hands præste-kald Sandøe ligger kort fra Thorshavn og er læt at komme baade fra og til saa vel vinter som sommer;
- b) hand er en læt-føer mand hurtig og beqvem til at reise baade til lands og vands;
- c) Hand er vederhæftig fremfor alle de andre Præwster her i landet og  en vel bemidlet mand, at ham kand sikkert betroes de Publique midler;
- d) Hand er fremfor alle de andre ved dræven i lands lov og ret;

# Vel Eisenberg!

- e) Hand er /: saa vidt menniskelig forstand kand indsee :/ redelig og ivrig for guds ære samt Hands anbetroede menigheders beste, saa at ingen Præst her i landet kand overgaae ham deri; det Jeg best af alle Præster her i landet kand bevidne, da Jeg er barnfødt i Sandøe og nogen tiid i mine Studenter-aar opholdt mig der hos mine forældre, og kand Jeg med en god samvittighed bevidne hvor trolig hand holdt over Kirke-disciplin Christendommens pligter og ungdommens forfremmelse i deres sanligheds kundskab at befordre;
- f) Hand er ustrafelig i liv og levnet, holder sig fra al anstød og forargelse, i sær fra den for Præster saa afskyelige drukenskab;
- g) Hand har myndighed, renlighed, anseelse og forstand i sin opførsel for at blive baade agtet og elsket af alle, hand er ikke indbildsk, urimelig og altfor paastaaende i nogen ting og følgelig er hand efter min eenfoldige mening beqvemmere end nogen anden Præst her i landet til at drive guds sag med god fremgang i Provste-Embedet.

# Eisenberg í brævi 29. mai 1776

- Eisenberg talar í sinum brævi um allar tær royndir hann hevur av Guðs náði nú í næstan 26 ára embæti.
- Hvussu hann í sínum biði- og studerikamari tekur undir við Dávidi kongi, at vit aldri kunnu løna Guði fyri allar hansara góðgerðir móti okkum.
- Hvussu eydnuríkur hann er at hava havt ein so góðan verfaðir og undanmann, gudrøknan og ágrýtnan.
- At Guð so mangan hevur hjálpt honum úr myrkri og trongdum.
- Verður hann valdur, skal hann taka próstabyrðuna á seg, hóast hann ikki er likamliga sterkur.
- Og so biður hann um at kunna ráðføra seg við biskup, hvørja ferð hann verður í iva um, hvussu eitt mál skal verða loyst.

Klokka í Nólsoy 1778-2016, kallað til gudstænastu 14.500 ferðir!



# Samanumtøka

- Millum allar prestar í Føroyum 1776 er Jacob Eisenberg tann, sum fær besta skoðsmál á øllum teimum økjum, sum mugu sigast at verða ynskilig hjá tí, sum skal røkja hetta embætið.
- Eftir brævinum at døma er hann eisini eyðmjúkur og gudrøkin, biður um hjálp frá Guði – og frá biskupi.
- Próst Hentze: “en flittig og nidkær Mand, der uagtet sin bestandige Skrøbelighed tro forrettede sit Embede. Hans Minde være i Ære og Velsignelse blandt Menighederne. Han staar ved Dagenes Ende, og af Overhyrden modtager han de tro Sjælesørgeres evige Naadeløn.”

# Tá ið Eisenberg doyr í 1783, standa eftir tær tríggjar døtrarnar

- Elsebeth Jacobsdatter Eisenberg, gift við Samuel Christiansen, bónda í Kirkjubø.
- Frederikke Marie Jacobsdatter Eisenberg, trúlovað og sama ár gift við Mikkel Clemendsen, sýslumanni undir Skarði.
- Maren Christine Jacobsdatter Eisenberg, gift sama árið við Peter Hentze, nýggja sandspresti og seinni eisini Føroya prósti.
- Eftirkomararnir kunnu takka fyri at hava átt ein so góðan forfaðir í Eisenberg prósti.